gult20 cyan20 magenta20 svart20



***Ferðavinnan í Eysturoy** er ein felags stovnur hjá ferðavinnuni, einstaklingum og flestu kommunum í Eysturoy. Høvuðsendamálið er at marknaðarføra Eysturoynna, við atliti at fáa ferðandi at vitja limakommunurnar. Ferðavinnan í Eysturoy hevur 2 kunningarstovur, eina í Fuglafirði og eina í Runavík. Umframt at veita vitjandi, ið koma inn á gólvið dagliga kunning, skipar ferðavinnan í Eysturoy eisini fyri ymiskum tiltøkum. Ferðavinnan í Eysturoy hevur harumframt eitt tætt samstarv við vinnulívið í Eysturoynni og samskipar m.a. ymisk tiltøk hjá vinnulívinum.*

# Dagligur leiðari

Av tí at núverandi leiðari fer í annað starv, verður hervið søkt eftir dagligum leiðara til Kunningarstovuna í Saltangará, at byrja skjótast til ber. Starvið, ið er sera fjølbroytt, fevnir í høvuðsheitum um fylgjandi arbeiðsuppgávur:

**Uppgávur**

- daglig leiðsla av kunningarstovuni
- marknaðarføring og samskipan av Eysturoynni mótvegis ferðavinnuni.
- tilrættislegging av lýsingarátøkum
- at aktivt seta seg í samband við møguligar málbólkar bæði skrivliga og við kundavitjanum
- hava samskifti við kundar, sum venda sær til kunningarstovuna
- veita vitjandi eina góða ráðgeving og tænastu

Sum persónur hevur tú útbúgving innan sølu, marknaðarføring ella ferðavinnu. Viðkomandi royndir, kunnu eisini minkað um kravið til útbúgving. Førleiki til at kunna samskifta á enskum er ein fyritreyt. Tú kemur fyri tað mesta at arbeiða fyri teg sjálvan, og tí er neyðugt, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og ikki er bangin fyri avbjóðingum.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avtalu við arbeiðsgevara.

Umsóknir verða sendar skjótast gjørligt, og í seinasta lagi fríggjadagin 20. juli 2001 til:
Virkisráðgeving Spf. Boks 26, 600 Saltangará. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Símun Hammer á Virkisráðgeving, tlf. 44 95 91, ella til Símun Hansen á kunningarstovuni tlf. 211449. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**Virkisráðgeving Spf**

**Leiðsla - Búskapur - Marknaðarføring - Rekruttering - Góðsku-/Umhvørvisskipanir**
Heimasíða: http://www.konsult.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3201

Navn: Sp/f Anana
Adressa: 650 Toftir

Kommuna: Nes Kommuna
Stovningardato: 29.06.2001
Viðtøkudato: 29.06.2001
Kapitalur: Kr. 1.992.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kr. 1.992.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: Theodor Poulsen, 650 Toftir, Kjartan Poulsen, 650 Toftir og Jan Davidsen, Í Svanga 43, 100 Tórshavn.
Nevnd: Kjartan Poulsen, 650 Toftir (formaður), Theodor Poulsen, 650 Toftir og Jan Davidsen, Í Svanga 43, 100 Tórshavn.
Stjórn: Theodor Poulsen, 650 Toftir.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum, ella nevndarformanninum ella av allari nevndini.
Grannskoðari: : Sp/f Grannskoðarastovan á Skála, 480 Skála.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka fiskiskip o.a. í hesum sambandi.
Felagið er stovnað við umskipan av virki eftir um umskipanarlógini.

Skráseting Føroya tann 3. juli 2001

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3205

Navn: Sp/f Valdemar Lützen Rakstur
Adressa: Skálatrøð, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 29.06.2001
Viðtøkudato: 29.06.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Valdemar Lützen, A.C. Evensensgøta 8, 100 Tórshavn og Kim Lützen, Skálatrøð 12, 100 Tórshavn.
Nevnd: Valdemar Lützen, A. C. Evensensgøta 8, 100 Tórshavn (formaður), Halldis Lützen, Oman Viðarlund 2, 100 Tórshavn og Mogens Lützen, Bryggjubakki 2, 100 Tórshavn.
Stjórn: Kim Lützen, Skálatrøð 12, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: : P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 29.06.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 3. juli 2001

Kristin Balle




**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3210

Navn: Sp/f Vesturberg
Adressa: 210 Sandur

Kommuna: Sands Kommuna
Stovningardato: 22.06.2001
Viðtøkudato: 22.06.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Ragnar Fossdalsá, 210 Sandur.
Stjórn: Ragnar Fossdalsá, 210 Sandur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Revisión v/ Kaj Joensen, Stoffalág 4, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 22.06.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, keyp, søla og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 4. juli 2001

Kristin Balle




gult21 cyan21 magenta21 svart21



# Arbeiðsfólk

**søkist til Elverkið hjá SEV á Sundi**

Søkt verður eftir einum arbeiðsfólki, sum avloysari til elverkið á Sundi, árið út.

Ongin serstøk faklig útbúgving krevst til starvið, sum umfatar ymiskt fyrifallandi arbeiði ´a Sundsverkinum, herundir at ganga maskinmeistarunum til handar, at halda elverkið reint, vaska filtur og maskinlutir o.a.

Arbeiðstíðin er vanlig 40 tíma vika frá mánadegi til fríggjadag.

Lønin verður sambært galdandi sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Osvald Hansen, verksmeistara ella til skrivstovuna hjá SEV í Tórshavn, tlf. 311366.

Umsóknir saman við møguligum ummælum skulu sendast til Elfelagið SEV, Postrúm 319, 110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinast alagi tann 16. juli 2001.

**Elfelagið SEV**

Søkt verður eftir

# dagrøktarmammu

at byrja 20. august, fyribils í hálvt ár.

Umsóknir skulu vera dagrøktini í hendi seinast 16. juli.

**Dagrøktarskipanin**
í Sjóvar Kommunu
490 Strendur

# Skaddur bilur til sølu

Vegna P/f Trygd selja vit henda BMW 525 tds, sum hann stendur, treytað av, at nøktandi boð verður givið.

Bilurin er frá 1993, hevur koyrt um 185.000 km.

Myndir síggjast á www.bilar.fo

**Úrvalsbilar Spf.**
Bakkavegur
530 Fuglafjørður

**tlf. 444943 og 217704**
Fax 444638
Teldupost: bilar@bilar.fo

# Heilsuhjálparafelag Føroya

Skrivstovan er stongd vegna summarferiu frá mánadegi 9. juli, opið verður aftur mánadagin tann 30. juli.

**Nevndin**

# Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstova okkara stongd í tíðarskeiðnum 9. juli til 6. august. Vaktartelefonin svarar á tel. 350 350.

**VIT sp/f**
Tórsgøta 16
Tel. 350350

# Hús til sølu



Um hóskandi boð fæst, verða sethúsini í Onnugøtu 15 seld.

Áhugaði kunnu ringja á

**tlf. 315371 ella 257478**

**Til Hvannasunds Kommunalu Dagrøktarskipan verður við hesum søkt eftir:**

# leiðara við námsfrøðiligari útbúgving

at byrja skótast gjørligt. Talan er um hávltíðarstarv.

**Lønar- og setanartreytir** eru sambært sáttmálan við Føroya Pedagogfelag, lønarfl. 15, stig 20-24.

**Fleiri upplýsingar** um starvið fáast við at venda sær til Gunvør Eliasen kommunuskrivara á telefon 452007.

**Umsóknir** vera at senda til:

**Hvannasunds Kommunu**
740 Hvannasund

og skulu vera kommununi í hendi **í seinasta lagi 20. juli 2001.**

Søkt verður eftir dagrøktarmammum at byrja 1. september, fyribils í hálvt ár, at ansa børnum í 1. og 2. flokki.

Umsóknir skulu vera dagrøktini í hendi seinast 16. juli.

**Dagrøktarskipanin**
**í Sjóvar kommunu**
490 Strendur

# Frá Epileptikarafelagnum

Aðalfundur verður í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10, Tórshavn, hóskvøldið klokkan 19.00.

**Nevndin**

# NetCafé Orion

Í sambandi við at NetCafé Orion møguliga fer at keypa nýggjar teldur, verða núverandi teldur seldar fyri spott prísir.

Talan er um 12 teldur, sum verða seldar fyri 7.000,- pr. stk, skunda tær og ring um tú ætlar at ogna tær eina teldu fyri hendan spott prís.

**NetCafé Orion**
Tlf. 216676

# Frá Fuglafjarðar kommunu

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd frá 09. juli – 27. juli 2001.

**Fuglafjarðar kommuna**

# Gjaldstovan hevur afturlatið

í viku 29 og 30 – tað er frá 16. til 29. juli vegna summarfrí.

Boð kunnu tó sendast á telefaks 352401 ella við teldupost til gjaldstovan@gjaldstovan.fo

**Føroya Gjaldstova**
Boks 2009
165 Argir
Tlf. 352400

# Haldórsvíkar Skúli

Søkt verður eftir lærara til tíðaravmarkað starv við Haldórsvíkar Skúla fyri skúlaárið 2001/2002.

Starvið er 9 tímar um vikuna. Tann, ið verður settur, má kunna undirvísa í heimkunnleika og handarbeiði.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi leygardagin 21. juli.

**Haldarsvíkar skúlanevnd**
v/ Tórhild Hansen
438 Langasandur